




*Starvsfólkini hjá Hoyrnini f.v.: Jutta Helgadóttir, stjóri, Sigmund Signarsson, søla- og bókhald, og Heidi Simonsen skrivari*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Hoyrnin – hoyritól og oyrnaverd

**Hoyrnin í Niels Finsensgøtu selur og veitir ráðgeving til alt sum hevur við hoyritól og oyrnaverd at gera.**

Hoyrnin, sum er Føroya fyrsta einskilda hoyriklinikk, ynskir at bjóða føroyingum ein valmøguleika til ta almennu hoyriklinikkina. Hoyrnin leggur dent á at fyribyrgja hoyriskaðum og at veita fólki við niðursettari hoyrn hjálp við t.d. persónligari ráðgeving og góðari tænastu.

Tað er Jutta Helgadóttir, sum eigur og rekur klinikkina. Hon er útbúgvin hoyrnaatstøðingur frá Hoyriklinikkini á Vejle Sjúkrahúsið í 2003. Jutta sigur, at tað er sera umráðandi, at brúkarin kemøur væl frá byrjan við at læra at brúka hoyritólið til fulnar.

Hoyrnin samstarvar við leiðandi fyritøkur í heiminum og verður javnan dagførd um nýggjastu tøknina.

Umframt at selja hoyritól selur Hoyrnin eisini formstoypta oyrnavernd til fólk, sum t.d. starvast við tónleiki, maskinarbeiði ella á dagstovni. Oyrnavernd er til øll, sum eru í umhvørvi við larmi. Til ber at bíleggja sær tíð hjá Hoyrnini til eina ókeypis hoyriroynd. Eisini kann ráðgevi frá Hoyrnini koma á arbeiðsplássið at greiða frá um larm og óljóð, og teir skaðar tað elvir til.

Tað nýggjasta frá Hoyrnini eru tey spildurnýggju hoyritólini við BestSound Technology frá Siemens, sum øll eru vælkomin at royna ókeypis, sigur Jutta Helgadóttir frá Hoyrnini.